# Gamli »Teistin« í Kroatia

## Gamli »Teistin« siglir sum strandferðsluskip við kroatiska skergarðin

SKIP
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

"Tá gamli »Teistin« fór av landinum í 1997 vóru tað italiumenn, sum keyptu hann. Síðani tá hava vit fingið ein nýggjan Teista í Føroyum, og gamli »Teistin« hevur eisini leitað sær nýggjar leiðir.

Fyri góðari viku síðani varð hann avmyndaður í kroatiskum sjógvi. Gamli »Teistin«, ella »Jadrolinija«, sum hann eitur nú, er hvíttmálaður og virkar nú sum strandferðsluskip við skergarðin í Kroatia. Tað er Rógvi Finnsson Johansen, sum arbeiðir á Tilbúgvingarstovninum, sum hevur tikið myndirnar av gamla Teistanum í Kroatia.

Fyrra ferðin var í september í fjør, har gamli »Teistin«, liggur í havnini í Split. Seinnu myndina tók hann fyri góðari viku síðani við innisiglingina til havnina í Hvar-bý á oynni Hvar, har Rógvi luttók á ráðstevnu."



*Gamli »Teistin« við kei í Kroatia*

*Mynd: Rógvi Finnsson Johansen*



*Gamli »Teistin« á ferð millum kroatiskar oyggjar*

*Mynd: Rógvi Finnsson Johansen*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av útnyrðingi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, seint um kvøldið upp í stívt andøvsgul av eystri. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og møguliga regn eitt skifti, annars sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 9 og 13 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 17 |
| Nuuk | 14 |
| Qaqortoq | 17 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 14 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 16 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 13 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 26 |
| Bukarest | 32 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 27 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 35 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 33 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 13 |
| New York | 30 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | -- |
| La Paz | 2 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 1 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 996 hPa. við Lofoten kemur spakuliga hendavegin. Ein veikur hátrýstryggur sunnan fyri Ísland verður yvir Føroyum hósmorgunin.




**Í davg:**
Lágtrýstið skamt í landnyrðing úr Føroyum fer í landsynning.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 9/7 kl. 06⁰⁰ – 10/7. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,6°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 1/7 kl. 06⁰⁰– 2/7 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 28,0 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 7. juli | Seinna kvarter<br>Jørðin longst frá sólini |
| 9. juli | Mánin næstur jørðini |
| 14. juli | Tendring |

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11. Juli | 04.18 | 16.47 | 03.18 | 15.47 | 03.33 | 16.02 | 06.18 | 18.47 | 07.18 | 19.47 | 02.33 | 15.02 | 01.33 | 14.02 | 04.33 | 17.02 | 05.33 | 18.02 | 04.03 | 16.32 | 05.18 | 17.47 |
| 12. Juli | 05.17 | 17.47 | 04.17 | 16.47 | 04.32 | 17.02 | 07.17 | 19.47 | 08.17 | 20.47 | 03.32 | 16.02 | 02.32 | 15.02 | 05.32 | 18.02 | 06.32 | 19.02 | 05.02 | 17.32 | 06.17 | 18.47 |
| 13. Juli | 06.17 | 18.47 | 05.17 | 17.47 | 05.32 | 18.02 | 08.17 | 20.47 | 09.17 | 21.47 | 04.32 | 17.02 | 03.32 | 16.02 | 06.32 | 19.02 | 07.32 | 20.02 | 06.02 | 18.32 | 07.17 | 19.47 |
| 14. Juli | 07.16 | 19.45 | 06.16 | 18.45 | 06.31 | 19.00 | 09.16 | 21.45 | 10.16 | 22.45 | 05.31 | 18.00 | 04.31 | 17.00 | 07.31 | 20.00 | 08.31 | 21.00 | 07.01 | 19.30 | 08.16 | 20.45 |
| 15. Juli | 08.12 | 20.40 | 07.12 | 19.40 | 07.27 | 19.55 | 10.12 | 22.40 | 11.12 | 23.40 | 06.27 | 18.55 | 05.27 | 17.55 | 08.27 | 20.55 | 09.27 | 21.55 | 07.57 | 20.25 | 09.12 | 21.40 |




